

# Talið av handverkslærlingum met lágt

Alt bendir á, at talið á handverkslærlingum fer at seta botnmet. Tað verður lægri, enn tað var eftir kreppuna í 1995, verður sagt av Yrkisdeplinum. Síðani oktober mánað í fjør er lærlingatilgongdin komin niður á eitt sera lágt støði. Í mun til trý tey seinastu árini er tilgongdin í 2009 minkað frá 324 í 2006 til 108 sama tíðarskeið í 2009. Á Yrkisdeplinum siga tey, at um henda tilgongdin heldur fram árið út, verður talið á lærlingum í 2009 umleið 140, og er tað minni enn talið á lærlingum var beint eftir kreppuna í 1995, tá lærlingatalið var 151.



*Ein av teimum heilt fáu, sum hevur upplivað lívið í Íslandi sum føroyskur útróðrarmaður, er Kaj í Bartalsstovu úr Gøtu*



*Skúlin í Vopnafirði er bygdur sum brúgvin á einum skipi*

## Ikki strævið

Hesin túrurin gjørdist sum nevnt drúgvur. Heilir 11 tímar gingu frá tí, at farið var av Norrönu til ferðalagið aftur var umborð. Tað førdi við sær, at kokkar og tænarar máttu hava eyka leingi opið, fyri at ferðalagið skuldi fáa ein bita at eta. Talan var um kalt borð, og tað var íroknað prísin fyri hendan túrin, Í slóðum føroyinga í Íslandi, so tað var ikki verri enn tað.

Fólk vóru móð eftir túrin, men kortini helt eingin, at tað hevði verið ov strævið. Fólk, sum Sosialurin tosaði við, hildu, at túrurin var framúr góður.

Og øll vóru samd um, at sjálvt um stak góða veðrið var prikkurin yvir i'inum, so var tað Óli Jacobsen, sum við sínum framúr áhugaverdu frásagnum, ið gjørdi túrin so góðan.

- Óli Jacobsen ER túrurin, staðfesti Annika Larsen Black heilt einfalt.

Mikudagurin gjørdist langt frá so langur, men hann gjørdist rørandi, tá minningarhald varð hildið yvir teir sjey menninar av Riddaranum, sum sjólótust í september 1927, tá skipsbáturin hálvdist. Bert ein av átta monnum slapp frá vanlukkuni við lívinum, og teir fimm, sum vórðu funnir aftur, vórðu jarðaðir í Seyðisfirði 6. oktober 1927.

Tað var í gjár, 30. september, júst 82 ár síðani vanlukkan við manningini á Riddaranum hendi.

Meiri verður um hendan serliga túrin, »Í slóðum føroyinga í Íslandi« komandi dagarnar.



*Tá ferðalagið kom á Vopnafjørðin, høvdu íslendsku vertirnir gjørt leskiligt matarborð til reiðar*